tríggjar vikurnar høvdu teir fraktað eina rúgvu av korni higar við lastbilum. Kornið varð keypt í Arussi, einum landsparti sunnanfyri Addis Abeba. Landið er so stórt, at tað kundi væl vera turkur eina staðni og ikki í øðrum støðum. Tað ráddi um at fáa so nógv korn sum gjørligt higar, áðrenn regnið byrjaði. Tá verða vegirnir so uppbloyttir, so tað er ikki framkomandi við lastbilum.

Vanligt er annars, at tað eru tvær árligar regntíðir. Tann fyrra og longra er í mars apríl, mai og juni. Tann seinna og styttra er í september og oktober. Regntíðirnar kundu tó verða sera óregluligar.

## Nýggj kirkja

Nýggja kirkjan í Konso varð vígd sunnudagin 2. mars 1975, og var tað ein stórur dagur fyri okkum øll. Fólk vóru komin ymsastaðni frá, so kirkjan var fullsett og meira enn tað. Nógv fólk sótu uttanfyri.

Kirkjan er einføld og hugnalig. Á framvegginum, sum er málaður við vøkrum grønum liti, er festur ein stórur trækrossur. Talarastólurin, altarborðið og beinkirnir eru eisini av lakeraðum viði. Beinkirnir vóru komnir úr yrkisskúlanum, sum missiónin rak í Arba Minch. Alt var sostatt til reiðar til dagin.

Tað kundu sita 7-800 fólk inni, men tá sótu tey trongt. Tað vóru umleið 4000 limir í Mekane Yesus kirkjuni í Konso landspartinum. Umframt hesa kirkjuna vóru eisini kirkjur í fleiri av bygdunum.

## Máttu sáa fýra ferðir

Vit eru í mai. Regntíðin byrjaði seinni enn vanligt hesaferð, so summi sáaðu upp til fýra ferðir, áðrenn tað fór at regna av álvara. Hvørja ferð tað fór at næla, varð tað sviðið av sólini, av tí at eingin væta var.

Tveir seinnapartar í eini viku regnaði, so tað munaði. Jørðin sum nú leingi hevði verið skróvturr, drakk vætuna í seg og skjótt spretti grasið her uttanum. Av tøkunum rann vatnið niður í brunnarnar, sum nú allir vóru tómir.

Um tað helt áfram ein mánað afturat, skuldi grøðin farið at verið tolulig, hóast akrarnir sóu misjavnir út sum var.

## Ikki tørvur á meira hjálpiarbeiði

Vit eru komin til august 1975. Hjálpararbeiðið var nú hildið uppat hesaferð. Tað hevði regnað bara væl hesa regntíðina, og akrarnir sóu heilt toluligir út. Nú fór fólkið at klára seg við sínum egna korni tað, sum eftir var av árinum. Vit hildu tó fram á klinikkini at býta út mjólkapulvur og greytamjøl til teirra, ið tørvaðu tað.

Vit fingu boð um at koma út til eina bygd, sum eitur Abaroba, av tí at har gekk ein so ring eygnasjúka í bygdini. Skúli, fyristøðumaðurin, koyrdi meg hagar. Tað tekur ein tíma at koyra. Tá ið vit komu fram, var ein hópur av fólki komin saman og bíðaði eftir okkum. Tað vísti seg, at serliga nógv børn vóru álvarliga sjúk í eygunum, og nøkur vóru enntá næstan blivin blind. Heilivágurin er pensilin og salva.

Vit góvu viðgerð til meira enn 100 fólk við eygnasjúku, meginparturin vóru børn. Síðan lærdu vit tey, hvussu tey í mongum førum kundu fyribyrgja eygnasjúku. Nógv fólk hava eygnasjúku í teimum flestu bygdunum. Tær nógvu flugurnar gera sítt til at bera smittuna ímillum manna. Flugurnar eru ein rættulig plága.

Hagtølini vístu, at á klinikkini høvdu vit 39.921 viðgerðir í 1974. Hetta svaraði til 130 um dagin, tá ið sunnudagar verða tiknir frá.

## Fari til Arba Minch

Í 1977 eri eg komin til Arba Minch eftir at hava verið í Føroyum í farloyvi. Arba Minch merkir "40 keldur." Her er nóg mikið av vatni og tað er eisini gott. Býurin liggur 500 km sunnanfyri Addis Abeba og 90 km norðanfyri Konso. Vegurin úr høvuðsstaðnum higar til Arba Minch er góður. Áfram til Konso høvdu teir eisini bøtt væl um vegin. Arba Minch gjørdist fyri nøkrum árum síðani lokali høvuðsstaðurin í landspartinum.

Ein dagin fór eg til Konso. Eg slapp við einum lastbili og fekk hann at taka búnyttirnar hjá mær í Konso higar til Arba Minch. Stuttligt var at hitta kenningar og vinir í Konso. Á klinikkini var nógv at gera sum áður.

Missiónsstøðin í Arba Minch liggur fyri seg sjálva millum tveir býir, og vit, sum arbeiddu á sjúkrahúsinum, búðu tætt við. Tað vóru tá tveir læknar og tvær útlendskar sjúkrasystrar. Yrkisskúlin er eisini her.

Tað eru einir 10 minuttir at ganga av sjúkrahúsinum niðan á sjálva missiónsstøðina. Har er kirkjan og skúlaheim er fyri umleið 130 ungfólk, sum ganga í skúla her í býnum og á handverkaraskúlanum hjá missiónini, har ungir etioparar fáa høvi til at læra træ- og jarnsmíð. Í býnum er stórur barnaskúli og hægri skúli



*Kirkjan í Konso*



*Gudstænasta í Konso. Á fremsta beinki sæst Hans Jacob Ellingsgaard, sum vitjaði í Etiopia í 1973. Hann var tá formaður fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið*



*Sjúkrahúsið í Arba Minch, har Elsa arbeiddi*

við. Tað búðu umleið 8.000 fólk her í Arba Minch, tá eg var har. Nú eru tey 50.000. Fólk flyta úr bygdinum til býin at fáa arbeiði sum so nógva staðni um allan heimin. Hetta er tó ikki altíð eydnan. Ofta eru trupulleikar bæði at fáa arbeiði og nakað at búgva í.

Á sjúkrahúsinum vóru 70 sengur, sum altíð vóru upptiknar. Barnadeild og blóðbanki eru komin afturat, síðan eg fór haðani. Umframt tey, sum eru innløgd á sjúkrahúsinum, komu um 100-200 fólk um dagin til viðgerðar á klinikkini, sum er partur av sjúkrahúsinum.

Landslagið er avbera vakurt her. Eystur eftir síggja vit útyvir eitt stórt vatn og fjallarøðir bæði norður eftir og suður eftir móti Konso. Vestanfyri okkum eru hægri fjøll, sum fyri tað mesta eru skógvaksin heilt niðan ígjøgnum. Missiónsstøðin liggur í umleið 1400 metra hædd. 50 km hiðani í vestan millum Gidole og Arba Minch í 2200 metra hædd liggur Geresse, har sum Doris arbeiðir.

## Kommunisman ger vart við seg: Missiónshúsið verður stongt

Her kann verða nevnt, at tað er ikki nógv, eg skrivaði um kommunistiska stýrið í mínum brøvum heim. Tað ráddi um at vera ansin, so sleppast kundi